# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
Tlf 341800

*– Vit eru heilt ótrúliga væl nøgd við hetta seinasta árið.*

*Unn Steingrund, forkvinna í starvsnevndini hjá Støkk*

# Støkk fegnast um sigurin

**Fimleikahøllin í Glyvra skúla var stúgvandi full av fólki, tá ið skipað var fyri móttøku í sambandi við sigurin hjá Støkk til Fimleikafagnaðin, sum var í norðurlandahúsinum í vikuskiftinum.**

FIMLEIKUR
*Lív Reinert Kjeld*
*liv.reinert.kjeld@sosialurin.fo*



*Fegnir venjarar hjá Støkk við gávum, blómum og steypum.*

Fimleikarar, venjarar, fyrireikarar, hjálparfólk, starvsnevnd, foreldur, vinfólk og politikarar fyltu fimleikahøllina í Glyvra skúla mánakvøldið, tá ið fimleikafelagið Støkk skipaði fyri móttøku í sambandi við, at Støkk vann Fimleikafagnaðin 2006.

Jastrid Weihe, skrivari í starvsnevndini hjá Støkk, bjóðaði vælkomin, og síðani helt Unn Steingrund, forkvinna, eina røðu, har hon rósti fimleikarum, venjarum, fyrireikarum og øllum, sum hava hjálpt til at gera úrslitið hjá felagnum so gott, sum tað gjørdist. Hon handaði venjarunum gávur sum tøkk fyri stóru arbeiðsorkuna, sum hevur verið løgd í verkætlanina.

Bodil Tausen og Joan Simonsen vóru høvuðsfyrireikarar hjá Støkk í ár, og hóast teirra unga aldur, megnaðu tær hesa stóru uppgávu til fulnar. Takkarlistin hjá teimum mundi ongan enda tikið, so nógv hava verið og hjálpt til í ár.

Hans Petur Ellingsgaard, formaður í mentanarnevndini í Runavíkar Kommunu, var eisini komin at heiðra felagið. Í røðuni segði hann millum annað, at Støkk ger eitt sera stórt arbeiði fyri børnini, ungdómin og tey vaksnu í kommununi, og tað eru øll sera takksom fyri. Venjararnir fingu eitt ordans herðaklapp, umframt blómur og heilsanir frá Runavíkar Kommunu. Nógv smíl vóru at síggja, tá ið hann segði: »Tit vita ikki, hvussu góðir vit eru við tykkum øll!« Fleiri kommunalir politikarar vóru at síggja í fimleikahøllini mánakvøldið, og Kári Højgaard, býráðslimur, bar eisini fram eina hjartaliga heilsan til felagið.

Tá ið røður og annað var av, var drekkamunnur, og fimleikararnir fingu endiliga høvi til sjálvi at síggja framførsluna hjá Støkk til fimleikafagnaðin, sum var víst á stórskýggja. Aftaná fingu øll, sum høvdu verið við til framførsluna hjá Støkk, handað heiðursbræv frá Føroya Fimleikasambandi.



*Tveir glaðir støkkarar: Joan Simonsen og Bodil Tausen við smílum, sigri og steypum!*

## Væl nøgd við árið

Fimleikafelagið Støkk av Glyvrum kann hátíðarhalda 40 ára stovningardagin 23. november, og tað er ikki sørt, sum tað hevur gingið væl hjá felagnum í ár. Støkk eigur fleiri av føroyameistarunum í amboðsfimleiki,